

# Danir nýtt nótaskip

Karstensens Skibsværft í Skagen hevur júst latið einum donskum reiðaríi nýtt nótaskip. Skipið hevur navnið Gitte Henning, sum er eitt kent navn í danskari fiskivinnusøgu. Nýggja skipið er teknað á teirri kendu teknistovuni hjá norska felagnum Vik og Sandvik Hendan sama teknistovan hevur teknað nýbygningin, sum gøtumenn lata byggja á Karstensens Skibsværft, og á heimasíðuni hjá Vinnuni ynskir føroyska reiðaríið danska reiðarínum tillukku við tí nýggja skipinum.



« á móttøku tann 30. oktober á Hotel Føroyum.

# Útlendski marknaðurin í fokus

Tór Verland Johansen, samskiftis- og internetráðgevi hjá Sansum, sigur, at í komandi ári verður meira ferð sett á virksemi við atliti til útlendska marknaðin. Sansir hevur havt eina deild í Keypmannahavn í eina tíð, men hevur ikki brúkt serliga nógva orku uppá at selja Sansir.net.

Kortini hevur Sansir selt 10 heimasíðuloysnir í Danmark í ár, og fleiri eru á veg í komandi ári. Tór Verland Johansen ivast ikki í, at við nýggju útgávuni, Sansir.net 2.0, er rætta løtan komin til at gera ein vørr á flatlondum.

Vit ætla at gera partnaraavtalur í 2009, og tann fyrsta er nærum komin undir land, sigur Tór Verland Johansen.

Partnaraavtala merkir í hesum sambandi, at aðrar fyritøkur selja heimasíðuloysnir, sum eru bygdar á Sansir.net 2.0. Harafturat verður Sansir.net umsett til spanskt, so at skipanin kann seljast í Spania og í Peru.

Hetta millum annað tí, at tey fólk sum eru í starvi hjá Sansum í Spania og Peru fegin vilja selja skipanina har, sigur Tór Verland Johansen.

ast allastaðni í skipanini. Til dømis kann tíðarstýringin vera eitt hent amboð hjá einum handli, sum vil kunna um eitt nýtt tilboð, men ikki ynskir at leggja hetta út á heimasíðuna, fyrr enn tíðin er inni til tess, og somuleiðis ynskir at taka tað av aftur heimasíðuni, tá tilboðið ikki er galdandi meir. Við tíðarstýringini ber til at gera alt hetta sjálvvirkandi.

**FAKTA**

Sansir.net hevur fostrað fleiri enn 150 vevsíður og portalar bæði í Føroyum, Danmark, Svøríki, Noreg og í Skotlandi. Í juni í ár vann ein av teimum, heimasíðan hjá Faroe Petroleum, prísin sum besta íløguheimasíða á keypskálanum AIM í London. Tað eru umleið 1700 fyritøkur úr 26 londum skrásettar á AIM, og av teimum vóru 6 tilnevndar til prísin, sum Faroe Petroleum altso vann

Vit elska góð tíðindi

About 80 % of businesses are expected to be using SharePoint by 2010, according to Gartner Research

Okkara kundar hava valt SharePoint framum aðrar skipanir innan:

- Uppgávustýring
- Skjalasavn
- Skjalahandfaring
- Dátu innsavning
- Workflow
- Intranet
- Extranet
- Internet/heimasíðu

Hevur tú fingið røttu ráðgevingina?

Stutt sagt so elska vit at loysa uppgávur í SharePoint!

intra

intra@intra.fo
+298 599 123

Intra er leiðandi innan Microsoft SharePoint við kundum á privata og almenna økinum, bæði í Føroyum og í Danmark. Vit hava hollar royndir innan Microsoft, .NET, SharePoint og Office 2007.